## Størsta hækking í tvey ár

Europeisku partabrævakursirnir halda fram at hækka, og tað er nú sjeyndi dagur upp í slag, at teir ganga uppeftir. Sambært Bloomberg er talan um longsta tíðarskeið við hækkingum síðani august 2007. Talan er ikki um ógvusligar hækkingar, men paneuropeiska Dow Jones Euro liggur kortini 0,6% hægri og bretska FTSE 100 hevur upplivað líknandi hækking Í Fraklandi hækkar CAC 40 somuleiðis 0,6%, eins og týska DAX liggur 0,6% hægri, skrivar boersen.dk



## Bjargingarpakkar fyri 23,7 milliardir dollarar

Amerikansku skattgjaldararnir kunnu koma at gjalda eina rokning upp á heilar 23,7 milliardir dollarar. Peningurin verður nýttur til hjálparpakkar til búskapin og sum neyðhjálp til trongdar fyritøkur. Tað metir Neil Barofsky, sum er serligur ráðgevi í fíggjarligu bjargingarætlanini hjá stjórnini, Troubled Asset Relief Programme, skrivar boersen.dk. Ein talsmaður í fíggjarmálaráðnum, Andrew Williams, heldur tó ikki, at tølini eru rætt. Higartil hevur stjórnin bert nýtt tvær milliardir dollarar, sigur hann.




*Ein heilur herur av ungum konufólki á keiini á Bursatanga fríggjadagin. Daman við myndini og ballónunum er Anja Jacobsen, og hon skal giftast leygardagin*

*Mynd: Leo Poulsen*

# Síðsti dagur sum single

**Fyrr var tað óhoyrt í Føroyum, men í dag verður neyvan parið gift, uttan at vinir halda ein sonevndan polterabend fyri komandi brúður of brúðgómi**

NÝGGIR SIÐIR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Sum orðið sigur stavar siðurin úr Týskalandi. Upprunaliga var hetta ein hending, har komandi brúðarparið saman bjóðaðu vinum og kenningum til samankomu uttan fyri húsini hjá brúðurini ella foreldrum hennara.

Talan var ikki um formliga innbjóðing til hvønn sær, men heldur gingu hesi tíðindi munn av munni. Matur og drekka var ein fastur táttur, men hæddarpunktið var, tá porselen og leirlutir vórðu knústir niður í vegin. Hetta skuildi merkja eydna hjá teimum, sum stóðu fyri at giftast.

Hesin siðurin hevur síðani breitt seg víða um. Bæði vestur eftir til USA og norður eftir til Danmark og síðani eisini til Føroya.

Fríggjadagin, tá vit komu framvið Bursatanga, var ein heilur herur komin í land av Rituni úr Nólsoy. Tað vóru ungar kvinnur, sum skuldu halda polterabend fyri einari vinkonu, sum komandi leygardag skal standa brúður í Nólsoy.

Tað skortar ofta ikki upp á hugskot, tá polterabend er á skránni, og viðhvørt kann tað ganga í so lívligt fyri seg. Sum um vikkuskiftið í Keypmannahavn, tá nakrir vinir »burturfluttu« komandi brúðgómin. Hetta fór fram á ein so fantasifullan hátt, at fólk ringdu til løgregluna, sum mannsterk møtti upp í einari park at loysa málið. Í tí førinum vóru tað nakrir fullir mans, teir møttu.

Her heima í Føroyum gongur tað kanska ikki so harðliga fyri seg, men tað er meiri enn so komið fyri, at løgreglan hevur verið við í spælinum og hevur »handtikið« komandi brúðurina.

### Meiri óskyldugt

Men vanliga gongur tað friðarliga fyri seg, og hjá mannfólkinum gongur tað ofta út upp á at fáa eitt stuttligt kvøld í býnum burtur úr.

Brúðgómurin í hesum føri kom til Føroya við flogfari fríggjadagin, og hann var tikin á flogvøllinum av vinmonnunum. Síðani í bili til Havnar, har tyrlan bíðaði. So gekk leiðin út í Skúvoy, har ein tími gekk í góðveðrinum við at práta við skúvoyingar og drekka øl.

So gekk leiðin norður á Borðuna, og síðani varð spákað heim eftir oynni, heim í bygdina.

Konufólkið fór sum nevnt til Havnar og síðani niðan í Bowlinghøllina at bowla og síðani eta ein bita. Øll endaðu úti í Nólsoy aftur um kvøldið, har tey hildu fram at hugna sær.

Soleiðis kann ein polterabend eisini ganga fyri seg, hetta nýggja trendið, sum allarhelst er komið fyri at verða.

## Ferðsluóhapp á Norðasta Horni

**Fýra bilar innblandaðir í ferðsluóhapp á Norðasta Horni**

FERÐSLUÓHAPP
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Fríggjadagin hendi eitt ferðsluóhapp úti á Norðasta Horni í Havn. Fýra bilar koyrdu eftir hvørjum øðrum móti Havnini, tá tann fremsti skuldi snara inn á Norðasta Horn.

Bilarnir, sum fylgdu eftir, vóru ikki nóg ansnir, og tann næstfremsti rendi upp í reyvina á bilinum, sum snaraði inn á Norðasta Horn. Men ikki nóg mikið við tí. Eisini teir báðir bilarnir, sum koyrdu aftan á, rendu upp í reyvina á teimum framman fyri so í alt fýra bilar vóru blandaðir upp í ferðsluóhappið.

Hetta hendi stutt fyri klokkan 17.30 fríggjadagin, og sjálvt um sjúkrabilur varð boðsendur, hendi eingin fólkaskaði. Skaðarnir á bilarnar vóru eisini bert smávegis.



*Tað er ikki ofta tað hendir, men ein »harmonikusamanstoytur« var fríggjadagin úti á Norðasta Horni, har ein bilur hjá Kringvarpinum var uppií*

*Mynd: Rigmor Dam*